# SÁTTMÁLI

Um samlagstrygging

millum

**Tryggingarfelagið LÍV P/F**

og

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**

við gildi frá 1. januar 2016

# Innihaldsyvirlit


§1. Hvør er fevndur av samlagstryggingini

§2. Upptøkureglur

a. Arbeiðsførisváttan
b. Karenstíð - Hættislig sjúka

§3. Tryggingarupphæddir

a. Við deyða
b. Ávísar hættisligar sjúkur
c. Gjaldsundantøka

§4. Útgjald av tryggingarupphædd

a. Skattaviðurskifti

§5. Útrokning av tryggingargjaldi

a. Starvsfólkayvirlit
b. Tryggingargjald og reguleringargjald

§6. Tagnarskylda

§7. Tryggingartreytir

§8. Sáttmálaskjøl

a. Gildiskoma og uppsøgn

§ 1

**Hvør er fevndur av samlagstryggingini**

Millum Tryggingarfelagið LÍV og Búskapar & Løgfrøðingafelag Føroya, verður gjørdur sáttmáli um samlagstrygging fyri limir í Búskapar & Løgfrøðingafelag Føroya.

Samlagstryggingin hevur gildi frá 1. januar 2016

Tryggingin er virkin, tá treytirnar í §2 viðvíkjandi upptøkureglum og heilsuupplýgingum eru uppfyltar.

Tryggingin er galdandi fram til tann 1. í mánaðinum, eftir at starvsfólkið er fylt 67 ár, ella fram til tann 1. í mánaðinum eftir at limur ikki er virkin limur í felagnum longur.

Starvsfólk, sum ikki longur eru limir í BLF, fáa tilboð frá LÍV um at halda áfram við tryggingingini uttanfyri felagið sambært teimum til einahvørja tíð galdandi treytum fyri einstaklingar.

§ 2

**Upptøkureglur**

BLF-limir, sum eru skrásettir áðrenn 01.01.2016 í verandi samlagstrygging hjá BLF, verða fluttir undir hesa nýggju samlagstryggingina, uttan at lata heilsuupplýsingar inn. Nýggir limir skulu lata persónliga heilsuváttan til góðtøku hjá LÍV.

Gjaldið fyri samlagstryggingina verður tikið av eftirlønargjaldinum og samlagstryggingin heldur uppat, tá LÍV ikki longur móttekur eftirlønargjald fyri limin.

Karenstíð: Tryggingin við "ávísar hættisligar sjúkur" tekur við ein mánaða eftir, at limur er komin í felagið. Sjúkan skal sostatt verða staðfest í minsta lagi ein mánaða aftaná innliman í samlagstryggingina.

§3

**Tryggingarupphæddir**
**a: Við deyða**

Doyr limur áðrenn fylta 67 ár, verða útgoldnar

| | |
|---|---|
| Limur 15-49 ár: | kr. 750.000 |
| Limur 50-54 ár: | kr. 600.000 |
| Limur 55-66 ár: | kr. 450.000 |

**b: Ávísar hættisligar sjúkur**

Samlagstryggingin fevnir eisini um upphædd í samband við "ávísar hættisligar sjúkur". Hendan upphædd verður útgoldin um limur ella børn hjá limi verða rakt av hættisligari sjúku, áðrenn starvsfólkið fyllir 67 ár.

| | |
|---|---|
| Tryggingarupphædd hjá starvsfólkinum | kr. 125.000,- |
| Tryggingarupphædd hjá børnum upp til fylta 18 ár | kr. 125.000,- |

Fyri børn er galdandi, at tryggingin av viðkomandi barni fellir burtur, verður tryggingarupphæddin útgoldin.

**c: Gjaldsundantøka**

Missir starvsfólk 2/3 ella meira av arbeiðsorku síni, fellur tryggingargjaldið burtur aftaná 3 mánaða óarbeiðsføri. Tryggingarfelagið LÍV rindar tryggingargjaldið so leingi óarbeiðsføri stendur við, tó í mesta lagi 3 ár.

**§ 4**

**Útgjald av tryggingarupphædd**

**Við deyða:** Útgoldið verður til "næsta avvarðandi", uttan so, at onnur skrivlig avtala er gjørd við LÍV. "Næsti avvarðandi" er í hesum sambandi "fyrst hjúnafelagin, tínæst børn og síðani arvingar sambært testamenti ella arvalógini". Við børn er her at skilja lívsarvingar og ættleitt børn hjá tryggjaða.

Hevur starvsfólk gjørt testamenti, ið eisini fevnir um útgjald frá hesari samlagstryggingini, skal váttað avrit sendast LÍV. Tað verður gjørt vart við, at testamenti, ið LÍV ikki hevur kunnleika til, sambært Tryggingaravtalulógini, ikki er galdandi í samband við útgjald av møguligari tryggingarupphædd.

Tryggingarupphæddin í samband við "hættisliga sjúku", verður útgoldin til starvsfólkið.

**a: Skattaviðurskifti**

Gjaldið til samlagstrygging er ein starvsfólka ágóði, og skal sostatt uppgevast sum skattskyldug inntøka.

Møgulig útgjøld frá hesari trygging gerast sostatt skattafrí.

§ 5

a: Starvsfólkayvirlit

Tryggingarárið er álmannanakkaárið. Við ársskiftið sendir Tryggingarfelagið LÍV, eitt yvirlit til Búskapar & Løgfrøðingafelag Føroya við upplýsingum um hvørjir limir eru fevnd av tryggingini. Búskapar & Løgfrøðingafelag Føroya eftirkannar listan og fráboðar Tryggingarfelagnum LÍV møguliga rættingar.

**b: Tryggingargjald og reguleringargjald**

Tryggingargjaldið fellur til gjaldingar 1/1 árliga frammanundan. Gjaldið til samlagstryggingina verður knýtt afturat eftirlønarinngjaldinum.

Tryggingargjald verður ásett samsvarandi koncessión fyri samlagstrygging, ið er galdandi fyri Tryggingarfelagið LÍV. Tryggingargjaldið verður ásett árliga og kann broytast í mun til skaðagongdina í limaskarðanum.

Minsta tal av tryggjaðum persónum: Fer talið niður um 25 persónar, heldur tryggin uppat tá tryggingarárið er lokið. Hetta verður fráboðað ið innskrivaðum brævi.

§ 6

Tagnarskylda

Allir upplýsingar, ið verða latnir Tryggingarfelagnum LÍV, verða givnir í trúnaði. Hetta er galdandi bæði meðan sáttmálin partanna millum er í gildi, og um avtalan møguliga heldur uppat.

§ 7

Tryggingartreytir

Fyri henda sáttmála galda Tryggingartreytir fyri Samlagstrygging sambært koncessión fyri Tryggingarfelagið LÍV og Tryggingartreytir fyri ávísar hættisligar sjúkur. Afturat hesum galda treytirnar í viðtøkunum fyri Tryggingarfelagið LÍV og galdandi lógir.

§ 8

**Sáttmálaskjøl**

Hesin sáttmáli verður undirskrivaður í tveimum einsljóðandi eintøkum og fær hvør partur sítt eintak í varðveitslu.

**a: Gildiskoma og uppsøgn av sáttmálanum**

Hesin sáttmáli verður settur í gildi tann 1. januar 2016

Sáttmálin avloysir eldri sáttmálar, sum eru undirskrivaðir áðrenn omanfyri nevnda dag.

Sáttmálin kann sigast upp skrivliga av báðum pørtum við 3 mánaða freist. Galdandi sáttmáli fer tá endaliga úr gildi við ársskiftið." Fyri LÍV kann uppsøgn av hesum sáttmála bert galda fyri skylduna til at innlima nýggj starvsfólk í skipanina.

Koma broytingar í virðisgrundarlagnum ella tryggingartreytunum, skal LÍV skrivliga fráboða Búskapar & Løgfrøðingafelag Føroya hesar broytingar.

Tórshavn, tann 19/1-2016

Tryggingarfelagið LÍV

P/f Tryggingarfelagið LÍV

Bartal Kass

Tórshavn, tann 19/1- 2016

Búskapar & Løgfrøðingafelag Føroya